LM-139/2020

From: Jónleif Johannesen <jonleif.johannesen@skulin.fo>
Sent: mánadagur, 19. apríl 2021 13:39
To: Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Subject: skjal til mentunarnevndina

Til Løgtingi
Viðheft er skjal í samband við hoyring í mentunarnevndini 19.04.21

bl.h
Jónleif Johannesen
Klaksvíkar Dansifelag

Viðmerkingar til Mál nr.: 21/00308

Uppskot til Løgtingslóg um stuðul til listafólk í sambandi við COVID-19

Hesar viðmerkingarnar hava til endamáls at fáa almannagagnligar felagsskapir o.o inn í lógaruppskotið eins og teir vóru í løgtingslóg nr. 103 frá 25. juni 2020 um stuðul til listafólk, tónleikafestivalar, almannagagnligar felagsskapir o.o, sum hjálpti almannagagnligum felagskapum í ávísan mun.

Eisini hava viðmerkingarnar til endamáls at tilliga umsøkjarakrøvini so fleiri almannagagnligar felagsskapir o.o kunnu fáa hjálp og møguleika at søkja. Í løgtingslóg nr. 103 frá 25. juni 2020 var eitt minsta mark innsett á 50.000 kr. vit mæla til at hetta minsta markið verður lækkað til 20.000 kr.

Í triðja lagi hava viðmerkingarnar til endamáls at tillaga útrokningargrundarlagið til stuðulin í samband við útleigan. Vit mæla til, at útrokningargrundarlagið í fyrstu syftu tekur útgangsstøði í leiguinntøkum undanfarin ár. Hetta mæla vit til, tí at síðan 12. mars 2020, tá COVID-19 tilmælini blivu partur av okkara dagligdegi, eru sera fáar útleigur skrásettar, tí fólk eru blivin tilvitað um hvat letur seg gera og ikki. Tí kann ikki bert hyggjast at avlýsingum fyri at staðfesta tapið tíðarskeiðið 1. september 2020 til 30. apríl 2021.

Vit mæla til at løgtingi við hesum viðmerkingum í huga tekur almannagagnligar felagsskapir við í hesa lóg eins og teir vóru í løgtingslóg nr. 103 frá 25. juni 2020.

Niðanfyri hava vit gjørt eitt uppskot til orðingar so hetta kann eydnast. Sigast skal, at orðingarnar ikki eru gjøgnumgingnar við løgfrøðiligum brillum. Til tess var tíðin ov avmarkað, nú eingin formlig hoyring hevur verið av uppskotinum.

Niðanfyristandandi uppskot byggir á ein leist, har vit í høvuðsheitum hava tikið orðingar úr lógaruppskoti nr. 103 frá 25. juni 2020 og Løgtingslóg um stuðul til listafólk, tónleikafestivalar og almannagagnligarfelagsskapir í sambandi við COVID-19, og sett tær inn í núverandi uppskot. Teksturin vit hava sett inn er markeraður við reyðum.

Nýtsluøkið

§ 1. Løgtingslógin fevnir um listafólk, almannagagnligar felagsskapir, hvørs tiltøk eru avlýst ella nógv avmarkað vegna almennu tilmælini um fyribyrging av COVID-19.

Listafólk og landafrøðilig avmarking

§ 2. Hugtakið listafólk sambært hesi løgtingslóg umfatar:

1) likamligan persón, ið hevur yrkislistaliga útbúgving ella samsvarandi royndir, ella sum fær munandi part av síni ársinntøku frá listaligum virksemi, ella

2) løgfrøðiligan persón, ið er skrásettur í Føroyum, og hvørs virksemi bert er av listaligum slagi.

Stk. 2. Stuðul verður latin til listafólk sambært stk. 1, ið kunnu vísa á, at tey hava verið fyri fíggjarligum tapi í tíðarskeiðinum 1. september 2020 til 30. apríl 2021. Stuðulin kann í mesta lagi vera 75% av staðfestum og skjalprógvaðum tapi.

Stk. 3. Fíggjarliga tapið sambært stk. 2 skal í minsta lagi vera 10.000 kr.

Stk. 4. Listafólk sambært § 2, stk. 1, nr. 1, ið søkja um stuðul, skulu lúka minst eina av hesum treytum, tey skulu:

1) vera búsitandi í Føroyum, ella

2) hava fast tilknýti til føroyska mentanarpallin

Stk. 5. Listafólk, ið sambært stk. 4, nr. 2 kunnu søkja um stuðul, kunnu tó bert søkja um stuðul fyri tiltøk í Føroyum.

§ 3. Hevur viðkomandi listafólk fingið stuðul úr aðrari almennari stuðulsskipan, verður hesin stuðul mótroknaður stuðli sambært hesi løgtingslóg. Hetta er eisini galdandi fyri almennan stuðul í øðrum londum.

Almannagagnlig tiltøk

§ 4. Stuðul kann veitast til tiltøk, sum eru almannagagnlig, har almenningurin hevur atgongd ella kann luttaka móti atgongugjaldi.

§ 5. Til almannagagnligir felagsskapir, hvørs tiltøk sbrt. § 4 eru avlýst ella nógv avmarkað vegna almennu tilmælini um fyribyrging av COVID-19 í tíðarskeiðinum 1. september 2020 til 30. apríl 2021, verður stuðul latin til at endurrinda mista inntøku.

Stk. 2. Stuðulin sbrt. stk. 1 kann í mesta lagi vera 75% av mistu inntøkuni, men kann tó ongantíð vera meira enn 400.000 kr. fyri hvønn felagsskap. Mista inntøkan verður

útroknað við støði í miðal inntøkuni fyri árini 2019 og 2018, sum skal vera skjalprógvað og staðfest.

Stk. 3. Er ikki gjørligt at rokna mistu inntøkuna sbrt. stk. 2, fær almannagagnligi felagsskapurin stuðul svarandi til 75% av skjalprógvaðum og staðfestum útreiðslum.

Stk. 4. Harumframt er stuðul sbrt. stk. 1 treytaður av, at metta inntøkan sbrt. stk. 2 er í minsta lagi 20.000 kr. Er talan um ein felagsskap ið hevur fleiri smærri tiltøk, skal inntøkan fyri tiltøkini til samans vera í minsta lagi 20.000 kr.

Stk. 5. Hevur viðkomandi almannagagnligi felagsskapur fingið stuðul úr aðrari almennari stuðulsskipan, verður hesin stuðul mótroknaður í stuðli sbrt. stk. 2.

Leiguinntøkur

§ 6 Til áhugafeløg og almannagagnligir felagskapir, sum fáa munandi part av sínum inntøkum frá hølisútleigan, og sum hava mist leiguinntøku vegna almennu tilmælini um fyribyrging av COVID-19, verður stuðul latin.

Stk. 2. Mista inntøkan verður útroknað við støði í miðal leiguinntøkuni fyri árini 2019 og 2018, men kann tó ongantíð vera meira enn 80.000 kr. tilsamans fyri hvønn felagsskap, sum skal vera skjalprógvað og staðfest.

Stk. 3. Er ikki gjørligt at rokna mistu inntøkuna sbrt. stk. 2, fær almannagagnligi felagsskapurin stuðul svarandi til 75% av skjalprógvaðum og staðfestum útreiðslum í tíðarskeiðinum frá 1. september 2020 til 30. apríl 2021. Stuðulin kann tó ongantíð vera meira enn 80.000 kr. tilsamans fyri hvønn felagsskap.

Stk. 4. Hevur viðkomandi áhugafelag ella almannagagnligi felagsskapur fingið stuðul úr aðrari almennari stuðulsskipan, verður hesin stuðul mótroknaður í stuðli sbrt. stk. 2.

Umsókn

§ 7. Umsókn um stuðul skal latast inn í seinasta lagi 1. juni 2021.

§ 8. Stuðul sambært hesi løgtingslóg er treytaður av neyðugari játtan á løgtingsfíggjarlógini ella aðrari játtanarlóg.

Stk. 2. Eru fleiri umsøkjarar, ið hava rætt til stuðul, enn tøk játtan er til, lækkar stuðulin lutfalsliga.

Eftirlit og afturrindan av stuðli

§ 9. Landsstýrismaðurin ella ein stuðulsmyndugleiki sambært § 10 hevur eftirlit við, at ásetingarnar í løgtingslógini verða fylgdar, og at tey, ið fáa stuðul, lúka treytirnar í løgtingslógini.

Stk. 2. Lýkur ein umsøkjari ikki longur treytirnar fyri at fáa stuðul, skal stuðulin heilt ella lutvíst rindast aftur.

Stk. 3. Hevur ein umsøkjari í sambandi við umsókn um stuðul ikki givið røttu upplýsingar ella móti betri vitan av órøttum fingið stuðul, skal viðkomandi ella deyðsbúgv hansara gjalda aftur ta upphædd, sum er fingin av órøttum.

Umsiting og kæra

§ 10. Landsstýrismaðurin kann eftir avtalu

við viðkomandi landsstýrismann leggja stuðulsumsitingina til ein myndugleika undir avvarðandi landsstýrismanni.

Stk. 2. Leggur landsstýrismaðurin sínar heimildir eftir løgtingslógini til myndugleika undir landsstýrismanninum ella til myndugleika, sum hoyrir undir annan landsstýrismann, kunnu avgerðir, sum myndugleikin hevur tikið, ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

Rættarvernd og innkrevjing

§ 11. Stuðulin kann ikki vera fyri rættarsókn, fyrr enn hann er útgoldin. Avtala um flutning er útgjaldaranum óviðkomandi.

§ 12. TAKS heintar inn ov nógv útgoldnan stuðul sambært hesi løgtingslóg.

Stk. 2. Rindar umsøkjarin, sum hevur fingið stuðul sambært hesi løgtingslóg, ikki rættstundis, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu.

Stk. 3. Ov nógv útgoldin stuðul, ið er kravdur inn sambært stk. 1 og 2, og sum er fallin til gjaldingar, kann verða innheintaður við panting. TAKS fremur pantingina eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum.

Stk. 4. TAKS er eisini heimilað at innkrevja skuld og innkrevjingarkostnað sambært hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldsskyldugu sambært reglunum um hetta í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Revsing

§ 13. Uttan so, at størri revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður revsaður við sekt tann, sum í sambandi við umsókn um stuðul letur villleiðandi upplýsingar ella dylur upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðina í málinum.

Stk. 2. Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum eftir kapitli 5 í revsilógini.

Gilsiskoma o.a.

§ 14. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann seta løgtingslógina úr gildi við kunngerð.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Uppskotið verður lagt fram fyri at hjálpa listafólkum, almannagagnligar felagsskapir o.o., ið eru rakt av avleiðingunum av COVID19. Avleiðingarnar standast av, at myndugleikarnir fyri at basa smittuspjaðing hava sett almen tilmæli í verk, sum raka listafólkini og almannagagnligar felagsskapir o.o. meint. Tilmælini hava gjørt, at møguleikarnir fyri framførslum, framsýningum og øðrum mentanarligum tiltøkum hava verið og framvegis eru avmarkaðir.

Samfelagið er í stóran mun latið uppaftur, tilmælini eru ikki eins strong, og avmarkingarnar eru minni umfatandi. Tað ber tó framvegis ikki til at ferðast frítt í heiminum, og tiltøk í Føroyum verða eisini avlýst ella útsett vegna kravið um sóttarhald við komu til landið. Framførslur og leiguinntøkur eru enn merktar av Covid-19 støðuni og færri í tali. Listafólkini verða tó ikki bert ávirkað av heimligu viðurskiftunum, men eisini av koronafarsóttini í heiminum sum heild. Tað merkir, at t.d. konsertferðir og framsýningar uttanlands hava verið avlýstar og útsettar.

Hjálparpakki 1 og 2 og løgtingslóg nr. 103 frá 25. juni 2020 um stuðul til listafólk,

tónleikafestivalar, almannagagnligar felagsskapir o.o. í sambandi við COVID-19 hava hjálpt

listafólkum í ávísan mun. Tørvur er tó á at lata uppaftur fyri møguleikanum hjá listafólki og almannagagnligum felagsskapum o.o at søkja stuðul. Hesum hevur Listafólkasamband Føroya (LISA) boðað frá.

Ætlanin er tí at gera eina stuðulsskipan lík tí skipan, ið var galdandi í 2020. Ávísar tillagingar

eru tó gjørdar, m.a. at listafólk, hvørs virksemi er skipað í ein løgfrøðiligan persón, eisini

kunnu søkja.

1.2. Galdandi lóggáva

Í fjør summar kom Løgtingslóg nr. 103 frá 25. juni 2020 um stuðul til listafólk,

tónleikafestivalar, almannagagnligar felagsskapir o.o. í sambandi við COVID-19.

Verandi uppskot byggir á leistin fyri ta lógina, men fevnir í hesum føri um listafólk og almannagagnligar felagsskapir o.o.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Uppskotið skal veita listafólkum og almannagagnligum felagsskapum o.o hjálp, ið hava tørv á hesum, tí tey hava verið fyri missi vegna COVID-19, almennu tilmælini og avmarkaðu virkismøguleikarnar.

Skotið verður upp, at uppskotið umfatar fíggjarligt tap í tíðarskeiðnum frá 1. september 2020

til 30. apríl 2021.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verður ein nýggjur møguleiki hjá teimum, sum virka á mentanar- og

listaøkinum, at fáa hjálp. Hjálparpakkarnir hava hjálpt summum á økinum, men við hesum uppskoti fáa fleiri listafólk og fleiri almannagagnligir felagsskapir o.o møguleika at søkja um hjálp í eitt longri tíðarskeið, t.e. eisini í tíðarskeiðnum frá 1. september 2020 og fram til 30. apríl 2021. Uppskotið skal vera við til at tryggja listafólkini og almannagagnligu felagsskapirnar o.o móti fíggjarligum missi, eggja til framhaldandi virksemi, og ágóðin er, at samfelagið eisini frameftir hevur eitt virkið og ríkt mentanar- og listalív.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið til formliga hoyring, men tørvir og møguleikar eru umrøddir við Listafólkasamband Føroya og TAKS.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan. Ætlanin er at biðja Løgtingið játta 4 mió. kr. til endamálið.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Ætlanin er eins og við lógini frá 2020 at leggja umsitingina av skipanini til TAKS, sum skal móttaka, viðgera og taka avgerð í málum um umsókn um stuðul. TAKS skal sostatt hava eftirlit við, at ásetingarnar í lógini verða fylgdar, og at tey, ið fáa stuðul, lúka treytirnar í lógini.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur positivar avleiðingar fyri skapandi vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið kann fáa jaligar avleiðingar fyri listafólk, ið fáa fíggjarligan styrk, um tey søkja og lúka treytirnar fyri stuðli.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Eingir millumtjóðasáttmálar eru, ið viðvíkja lógaruppskotinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Eingir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru, ið viðvíkja lógaruppskotinum.

2.9. Markaforðingar

Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið inniheldur ásetingar um revsing. Í § 10 er heimild at revsa við sekt tann, sum í sambandi við umsókn um stuðul letur villleiðandi upplýsingar ella dylur upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðina í málinum. Harumframt kann verða álagt løgfrøðiligum persónum revsiábyrgd eftir kapitli 5 í revsilógini.

2.11. Skattir og avgjøld

Lógaruppskotið hevur ongar skatta- ella avgjaldsáleggingar.

2.12. Gjøld

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Lógaruppskotið áleggur likamligum ella løgfrøðiligum persónum, ið søkja um stuðul, skyldur at lata rættar upplýsingar í sambandi við umsóknir um stuðul.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið leggur heimildir til landsstýrismannin og heimilar honum eftir avtalu við avvarðandi landsstýrismann at leggja umsitingina av skipanini til stovn hjá viðkomandi landsstýrismanni.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Ásetingin vísir, hvør kann søkja um stuðul sbrt. løgtingslógini. Talan er um 1) listafólk og 2) almannagagnligar felagsskapir. Yvirskipað er treytin fyri at fáa stuðul, at umsøkjarin er útleigari til, fyriskipari av ella luttakari í tiltaki, sum er avlýst ella nógv avmarkað vegna almennu tilmælini um fyribyrging av COVID-19.

Til § 2

Ásett verður, at listafólk og almannagagnligum felagsskapum o.o, ið kunnu vísa á eitt fíggjarligt tap í tíðarskeiðinum 1. september 2020 til 30. apríl 2021, kunnu søkja um stuðul.

Fyrst og fremst kunnu listafólk og almannagagnligum felagsskapum o.o fáa stuðul til endurrindan av mistum inntøkum, um umsøkjarin á nøktandi hátt kann gera sannlíkt, at viðkomandi hevði fingið eina ávísa inntøku, um ikki koronakreppan hevði rakt. Sum dømi kann nevnast, at viðkomandi kann vísa á eina skrivliga avtalu um eina framførslu í sambandi við eitt tiltak, sum varð avlýst. Er talan um eitt afturvendandi tiltak, kann umsøkjarin vísa á inntøku undanfarin ár.

Er tað hinvegin ikki gjørligt at gera sannlíkt, at viðkomandi hevði fingið eina ávísa inntøku, kann viðkomandi fáa stuðul til útreiðslur, ið viðkomandi hevur havt av at fyrireika eitt tiltak, ið varð avlýst, ella um ein staðfestur meirkostnaður er av at flyta tiltakið til seinni.
Hugtakið "listafólk" fevnir bæði um likamligar og løgfrøðiligar persónar. Fyri likamligar persónar er sett sum treyt, at persónurin annaðhvørt skal vera búsitandi í Føroyum ella hava fast tilknýti til føroyska mentanarpallin. Sum dømi um fast tilknýti til føroyska mentanarpallin kann nevnast rithøvundar, ið búgva uttanlands, men í stóran mun geva út tilfar á føroyskum ella útinnandi listafólk, sum í stóran mun virka í Føroyum. Listafólk, ið hava føroyskar røtur, men búgva uttanlands, og fyri tað mesta útinna sítt listaliga virksemi uttan fyri Føroyar, fella hinvegin uttan fyri ásetingina. Listafólk verður mett at vera búsitandi í Føroyum, um viðkomandi sambært Landsfólkayvirlitinum hevur bústað í Føroyum.
Hugtakið "listafólk" skal skiljast á sama hátt sum í kunngerð nr. 109 frá 21. september 2000

um Mentanargrunn Landsins, sum broytt við kunngerð nr. 156 frá 12. desember 2017, men fevnir eisini um onnur listafólk, ið fáa ein munandi part av síni ársinntøku frá listaligum virksemi. Eitt dømi kann vera tónleikari, ella tónleikabólkur, sum í stóran mun livir av tónleiki. Talan verður um eina meting í hvørjum einstøkum føri, men vegleiðandi kann sigast, at talan skal vera um ein part av inntøkuni á minst 50%. Hetta er í samsvari við ta meting, ið TAKS gjørdi í sambandi við umsitingina av stuðlinum, ið varð útgoldin sbrt. løgtingslóg nr. 103 frá 25. juni 2020 um stuðul til listafólk, tónleikafestivalar, almannagagnligar felagsskapir o.o. í sambandi við COVID-19.

Ein løgfrøðiligur persónur kann søkja um stuðul sambært hesum uppskoti, um virksemið hjá felagnum er av listaligum slagi. Orsøkin til, at løgfrøðiligir persónar eisini eru umfataðir av hugtakinum "listafólk", er, at fleiri listafólk skipa sítt listaliga virksemi í eitt nú smápartafeløg ella líknandi, og ynskið er, at hesi eisini kunnu søkja um stuðul.

Um listafólk útinnir sítt listaliga virksemi í einum einstaklingavirki og søkir um stuðul til útreiðslur, er lønin, ið viðkomandi sjálvur átti at fingið, eisini at rokna sum ein útreiðsla hjá einstaklingavirkinum, og ikki bert lønin til onnur starvsfólk.

Til § 3

Ásett verður eisini, at um viðkomandi listafólk fær stuðul úr aðrari almennari stuðulsskipan, verður stuðulin mótroknaður. Hugtakið "almenn stuðulsskipan" er ein stuðulsskipan, ið landsmyndugleikarnir hava sett í verk. Hetta er eisini galdandi fyri stuðul, ið listafólkið hevur fingið frá almennum myndugleikum í øðrum londum.

Til § 4

Ásetingin allýsir hugtakið"almannagagnligt tiltak"sbrt. hesi løgtingslóg. Talan er um eitt tiltak, sum fólk hava atgongd til ella kunnu luttaka í móti gjaldi. Sum heild merkir hugtakið "almannagagnligt" nakað,ið gagnar almenninginum (í mun til vinnuligt,ið gagnar einum ella fleiri ávísum persónum). At tað gagnar almenninginum merkir ikki, at tað endiliga skal gagna samfelagnum sum heild, men einum breiðum skara av fólki. Talan er vanliga um ein felagsskap (forening), ið virkar innan eitt ávíst øki, eitt nú umhvørvisvernd, humanitert virksemi, listaligt virksemi, mentunarlitvirksemi ítróttavirksemi, átrúnaligt virksemi o.s.fr

Til § 5

Ásett verður, at almannagagnligur felagsskapur, hvørs tiltøk eru avlýst ella nógv avmarkað, kann fáa stuðul. Stuðulin er avmarkaður til tiltøk, ið skuldu havt verið hildin í tíðarskeiðinum 12. mars til 31. august 2020. Um eitt tiltak kortini kann haldast seinni í árinum, verður stuðul ikki latin fyri tað tiltakið. Stuðulin er 75% av mistu inntøkuni. Fyri at meta um, hvussu stórur inntøkumissurin er, verður ein mett inntøka útroknað við støði í miðalinntøkuni fyri sama tíðarskeið árini 2019 og 2018. Um felagsskapurinikki hevur mist alla inntøkuna, verður stuðul latin samsvarandi muninum á mettu inntøkuni og staðfestu inntøkuni. Tiltøkini skulu hava eina metta inntøku, sum í minsta lagi skal vera 20.000 kr.

Er talan um sama felagsskap, ið hevur fleiri smærri tiltøk, skal inntøkan fyri tiltøkini tilsamans vera í minsta lagi 20.000 kr. Ásett verður eisini, at um felagsskapurin fær stuðul úr aðrari almennari stuðulsskipan, verður stuðulin mótroknaður. Hugtakið "almenn stuðulsskipan" er ein stuðulsskipan, ið landsmyndugleikarnir hava sett í verk.

Til § 6

Ásett er at áhugafeløg og almannagagnligir felagskapir, sum fáa munandi part av sínum inntøkum frá hølisútleigan, og sum hava mist leiguinntøku vegna almennu tilmælini um fyribyrging av COVID-19, kunnu fáa stuðul. Stuðulin fri mistari inntøku tekur støði í miðal leiguinntøkuni fyri árini 2019 og 2018, men kann tó ongantíð vera meira enn 80.000 kr. tilsamans fyri hvønn felagsskap, sum skal vera skjalprógvað og staðfest. Er ikki gjørligt at rokna mistu inntøkuna sbrt. stk. 2, fær almannagagnligi felagsskapurin stuðul svarandi til 75% av skjalprógvaðum og staðfestum útreiðslum í tíðarskeiðinum frá 1. september 2020 til 30. apríl 2021. Stuðulin kann tó ongantíð vera meira enn 80.000 kr. tilsamans fyri hvønn felagsskap.

Ásett verður eisini, at um almannagagnligi felagsskapur fær stuðul úr aðrari almennari stuðulsskipan,

verður stuðulin mótroknaður. Hugtakið "almenn stuðulsskipan" er ein stuðulsskipan, ið

landsmyndugleikarnir hava sett í verk. Hetta er eisini galdandi fyri stuðul, ið listafólkið hevur

fingið frá almennum myndugleikum í øðrum londum

Til § 7

Ásett verður, at freistin at søkja um stuðul er 1. juni 2021.

Til § 8

Ásett verður, at stuðul sambært uppskotinum er treytaður av, at neyðug játtan er fingin til vegar. Tað merkir, at um játtanin ikki røkkur til allar stuðulsumsóknirnar, lækkar stuðulin lutfalsliga.

Til § 9

Ásett verður, at landsstýrismaðurin, ella annar stuðulsmyndugleiki sambært § 10, hevur eftirlit við, at ásetingarnar í lógini verða fylgdar, og at tey, ið fáa stuðul, lúka treytirnar.

Ásett verður, at um tey, ið fáa stuðul, ikki longur lúka treytirnar, skal stuðulin rindast aftur heilt ella lutvíst. Um umsøkjari ikki hevur givið rættar upplýsingar, ella móti betri vitan av órøttum hevur fingið stuðul, skal upphæddin, ið viðkomandi av órøttum hevur fingið, rindast aftur.

Til § 10

Landsstýrismanninum verður heimilað at leggja umsitingina av stuðli sbrt. hesi løgtingslóg til annan myndugleika, tá avtala er gjørd við landsstýrismannin, ið varðar av viðkomandi myndugleika. Ger landsstýrismaðurin tað, er ásett, at avgerðir um stuðul ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika. Hetta er sama støða, sum er galdandi, um so er, at landsstýrismaðurin velur at umsita stuðulin sjálvur heldur enn at leggja hann til annan myndugleika at umsita.

Til § 11

Ásett verður, at stuðulin ikki kann vera fyri rættarsókn, fyrr enn hann er útgoldin. Avtala um flutning er útgjaldaranum óviðkomandi. Samsvarandi áseting er í § 5 í løgtingslóg nr. 103 frá 25. juni 2020 um stuðul til listafólk, tónleikafestivalar, almannagagnligar felagsskapir o.o. í sambandi við COVID-19.

Til § 12

Ásett verður, at TAKS krevur inn ov nógv útgoldnan stuðul eftir hesi lóg.

Eisini verður skotið upp, at rindar tann, sum hevur móttikið stuðul, ikki rættstundis, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu. Ov nógv útgoldin stuðul, ið er kravdur inn, ið er fallin til gjaldingar, kann verða innkravdur við panting. TAKS fremur pantingina eftir reglunum fyri

innkrevjing av skattum.

Eftir uppskotinum verður TAKS heimilað at innkrevja skuld og innkrevjingarkostnað við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldsskyldugu sambært reglunum um hetta í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

Talan er um víðgongt inntriv, men hildið verður ikki, at hetta er ein trupulleiki. Tað er í tveimum førum, at stuðulin skal gjaldast aftur: 1) Tá umsøkjari ikki longur lýkur treytirnar um stuðul ella 2) tá viðkomandi umsøkjari hevur fingið sekt fyri brot á § 9.

Í hvørgum føri verður hildið, at talan kann verða um próvligar avbjóðingar, ið áttu at ført við sær eina meira avmarkaða heimild.

Til § 13

Ásett verður, at uttan so, at størri revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verður revsaður við sekt tann, sum í sambandi við umsókn um stuðul letur villleiðandi upplýsingar ella dylur upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðina í málinum.

Tað kann verða álagt løgfrøðiligum persónum revsiábyrgd eftir kapitli 5 í revsilógini.

Til § 14

Áseting um gildiskomu. Heimilað verður landsstýrismanninum at seta løgtingslógina úr gildi við kunngerð. Orsøkin er, at talan er um løgtingslóg, ið bert er viðkomandi í einum avmarkaðum tíðarskeiði. Av tí at tað ikki er heilt greitt, nær TAKS væntandi verður liðugt við viðgerðina av øllum umsóknunum, er trupult at seta neyva dagfesting á, nær løgtingslógin skal fara úr gildi. Tí verður heimilað landsstýrismanninum at seta løgtingslógina úr gildi við kunngerð.

Vegna

Klaksvíkar Dansifelag 19.04.2021

Jónleif Johannesen, formaður